| | | |
|---|---|---|
| | **TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ**<br>**1. februar 2007** | Blað nr.:<br>**6839**<br>Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** **1. februar 2007**
**Stað:** **Býráðssalurin**
**Málsnr:** **1/07-12/07**

**FUNDARLEIÐARI:**
**Heðin Mortensen**

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Jógvan Arge
Leivur Hansen
Kári Árting
Marin Katrina Frýdal
Katrin Dahl Jakobsen
Elin Lindenskov
Annika Olsen
Bjarti Mohr
Beate L. Samuelsen
Sjúrður Olsen
Høgni Mikkelsen
Jan Christiansen
Heðin Mortensen

**LUTTÓK IKKI:**
Hildur Eyðunsdóttir

J. nr. 2004002360–7 SG

**LUTTÓK EISINI:**

**SKRIVARI:**
Jens M. Poulsen

**PROTOKOLLFØRARI:**
Tórgerð Hentze

**MÁL FYRI OPNUM HURÐUM, kl. 18.10:**

**Býráðsformaðurin setti fundin og las upp dagsskránna.**

**3/07** **2007-0170**

**Hildur Eyðunsdóttir hevur boðað frá, at henni berst frá at røkja starv sítt sum býráðslimur í meira enn samfullar 14 dagar.**

Sambært § 18, stk. 3, í kommunulógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Kári Árting, eru loknar.

**Býráðið 1. februar 2007:** Kári Árting tók sæti.

**4/07** **2007-0171**

**Mál beind í nevndir.**

**Býráðið 1. februar 2007:** Tikið til eftirtektar.

**5/07** **2006-3187**

**Mál viðv. roykivirkinum í Álakeri.**

Bygningurin er settur til sølu av Advokatskrivstovuni, sum hevur vurderað hann til 9,5 mió. kr.

Grundøkið, 2.590 ferm., eigur kommunan, og er bygningurin í tveimum hallum, tilsamans 1.161 ferm.

Húsamekling hevur vurderað húsini fyri kommununa, og teirra boð er kr. 7.830,00.

**Fíggjarnevndin 18. oktober 2006:** Fíggjarnevndin var á staðnum og hugdi eftir ognini.

Samtykt at kanna nærri, hvat ognin kann brúkast til.

**Tilmæli:**
Hølini eru egnað til m.a. felagsvirksemi av ymsum slag og serliga til virksemi við tilknýti til sjógvin.

Tørvur er á hølum hjá bæði Róðrarfelagnum Knørri og Bátafelagnum, sum halda til í ávikavist einum gomlum neysti og í einum gomlum bygningi, sum leigaðir er frá kommununi. Harumframt eru teir í Tórshavnar Froskmannafelag húsvillir. Bjargingarfelagið manglar eisini høli.

At enda kundi ein slíkur bygningur verið vælegnaður sum verkstaður til smábátar at leiga seg inn í í ávís tíðarskeið at gera ábøtur á smábátar o.l.

Tað fyrilligur ein virðismeting frá sp/f Protek, fyri Tórshavnar Kommunu, áljóðandi kr. 7.800.000 mió, og ein onnur virðismeting gjørd av Óla Jákup Guttesen fyri seljaran, sum ljóðar uppá kr. 9.648.000 mió.

Neyðugt er við nøkrum ábótum á bygningarnar, eins og roknast skal við ávísum niðurrívingum/burturbeiningum av køliútgerð o.l. útgerð. Harumframt kann roknast við ávísum krøvum til brunatrygd v.m. tá talan er um nýtslu av bygninginum til felagslig endamál. Neyvari meting er ikki gjørd av hesum viðurskiftum.

Tekniski stjórin metir, at virðismetingin hjá seljaranum er í hægra lagi, og metir boð millum kr. 7 og 8,5 mió. at verða meira hóskandi.

**Fíggjarnevndin 8. november 2006:** Arbeitt verður víðari við málinum m.a. við eini ætlan fyri, hvørji endamál bygningurin kann nýtast til, og hvørji feløg kunnu hava áhuga fyri at nýta hølini.

**Ískoyti:**
Víst verður á, at lendisdeildin eisini hevur tørv á hølum í staðin fyri íshúsið, sum teir fóru úr.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og kommunustjórin mæla til at keypa ognina fyri eina upphædd millum 7 og 8,5 mió. kr., og at samráðingar verða tiknar uppaftur við eigaran.

**Fíggjarnevndin 6. desember 2006:** Samtykt at heimila umsitingini at bjóða upp til ávísar upphæddir.

**Fíggjarnevndin 17. januar 2007:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Jógvan Arge og Marin Katrina Frýdal, mælir býráðnum til at keypa ognina fyri 7 mió. kr.

Ein minnluti, Jan Christiansen og Høgni Mikkelsen, mælir frá at keypa ognina.

**Býráðið 1. februar 2007:** Atkvøtt var um meirilutatilmælið frá Heðini Mortensen, Jógvani Arge og Marini Katrinu Frýdal í fíggjarnevndini, ið fall við 5 atkvøðum fyri og 8 ímóti

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen og Elin Lindenskovi.

Ímóti atkvøddu: Leivur Hansen, Kári Árting, Annika Olsen, Bjartur Mohr, Beate Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

**6/07** **<u>2006-2731</u>**

**<u>Ferðslutrygdin við Hoyvíkar skúla</u>**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Nevndarlimur hevur ynskt málið á skrá.
Umsitingin greiðir frá málinum.

**Tekniska nevnd 7. september 2006:** Nevndin samtykti, at umsitingin ger uppskot, sum tekur hædd fyri parkering og av- og ásetan við skúlan, at leggja fyri nevndina aftur skjótast gjørligt.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur á fundi 12. september 2006 við umboð fyri Hoyvíkar Skúla greitt frá ymsum uppskotum til loysn á ferðslutrupulleikanum kring skúlan.

Uppskotið, sum partarnir eru samdir í at arbeiða víðari við at leggja fyri til endaliga politiska støðutakan, tekur støði í,

**at** verandi inn- og útkoyring eystan fyri frítíðarskúlan verður liðugtgjørt, tað vil siga, at talið av p-plássum verður óboytt,
**at** av- og ásetingarplássið norðan fyri frítíðarskúlan eisini verður gjørt liðugt við smærri broytingum, og
**at** skúlagarðurin verður asfalteraður, samstundis sum frárenningarskipanin verður afturgjørd.

Umframt hetta uppskotið, vóru partarnir eisini samdir um at arbeiða víðari við fyriliggjandi uppskoti, sum tekniska nevndin á fundi í 8. desember 2005 samtykti við smærri broytingum.

Afturat hesum uppskotinum var eisini semja um at arbeiða víðari við uppskoti um p-plássið eystan fyri Hoyvíkshøllina.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til at játta kr. 100.000,00 av íløgum fyri vegir 2007 til projektering v.m. at leggja fyri teknisku nevnd aftur til endaliga støðutakan.

**Fíggjarnevndin 13. september 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at játta kr. 100.000 av íløgum 2006.

**Ískoyti:**
Umsitingin fer saman við umboðum frá Hoyvíkar Skúla at greiða frá arbeiðssetninginum til ráðgeva. Tá ið projektið er klárt, verður tað framlagt fyri teknisku nevndini áðrenn farið verður undir møguliga útbjóðing.

**Tekniska nevnd 19. september 2006:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Elin Lindenskov, Leivur Hansen og Sjúrður Olsen, samtykti, at umsitingin letur gera 2 uppskot (uppskot 1 og 2, dagf. 13. sept. 2006) at leggja fyri nevndina aftur sum skjótast.

Ein minniluti, Høgni Mikkelsen, mælir til at taka undir við uppskoti nr. 2 og at fara undir arbeiðið beinanvegin.

**Ískoyti:**
Í samráð við umboð frá Hoyvíkarskúla hevur umsitingin latið gera tvey uppskot til skipan av parkeringsøki og av- og áskipanarøki við Hoyvíkarskúla. Uppskot og kostnaðarmeting verður lagt fram á fundi í teknisku nevnd.

**Ferðslunevndin 5. desember 2006:** Nevndin tekur undir við báðum uppskotunum (j. nr. 2006-2731/5), men vísir á, at uppskot 1 hevur fleiri ferðslutekniskar fyrimunir í mun til uppskot 2. Víst verður til notat (j. nr. 2006-2731/7).

**Fíggjarlig viðurskifti.**
Fyriliggjandi uppskot koma at kosta kommununi umleið 4,4 mió. kr., og er býtið soleiðis:

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1) | Umvæling av verandi skúlagarði | kr. | 765.650,00 |
| 2) | Umvæling av vegi og p-øki við skúla/frítíðarskúla | - | 628.645,00 |
| 3) | Parkeringspláss sunnan fyri høllina | - | 1.025.110,00 |
| 4) | Parkeringspláss eystan fyri og norðan fyri høllina | - | 1.204.150,00 |
| Samanlagt u/mvg | | kr. | 3.623.555,00 |

| | | |
|---|---|---|
| Ókendar útr. ca. 10% | - | 362.356,00 |
| Projekt og eftirlit 7% | - | 253.649,00 |
| Bussskýli at flyta | - | 150.000,00 |
| Samanlagt u/mvg | kr. | 4.389.560,00 |

Sambært íløguætlan kommunurnar fyri 2007 og 2008 eru til verkætlanina settar 3 mió. í 2007 og 1 mió. í 2008. Tað vil siga, at tað koma at resta uml. 0,4 mió. í at fremja arbeiðið, og kann hetta gerast við at spara upp á asfalteringina í verandi skúlagarði.

Eftir sum eingin ítøkilig tíðarætlanin fyri arbeiðið fyriliggur er ilt at meta um nær farast kann undir arbeiðið, og hvussu langa tíð arbeiðið væntandi fer at taka. Best hevði verið um arbeiðið kundi verið gjørt meðan summarferian er, men sambært íløgukarmunum ber ikki til at fara undir arbeiðið fyrr enn í seinni hálvu í 2007, tí um farið verður undir arbeiðið eftir summarferiuna í 2007 ella móti heysti, ber til at leggja arbeiðið soleiðis til rættis, at tað verður liðugt fyrst í 2008.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at taka undir við niðurstøðuni hjá ferðslunevndini og at leggja málið fyri býráðið um fíggjarnevndina við umbøn um at fáa játtað 3 mió. kr. í 2007 og 1 mió. í 2008, áðrenn farið verður undir at bjóða arbeiðið út í innbodna lisitatión.

**Tekniska nevnd 13. desember 2006:** Nevndin samtykti at taka undir við uppskoti nr. 2 við smávegis broytingum vísandi til, at skúlastjórin og starvsfólkið á skúlanum halda tað vera betri fyri ferðslutrygdina í økinum og at leggja málið fyri býráðið um fíggjarnevndina við umbøn um at fáa játtað 3 mió. kr. av íløgum í 2007 og 1 mió. í 2008, áðrenn farið verður undir at bjóða arbeiðið út í innbodna lisitatión.

**Fíggjarnevndin 17. januar 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tekn-isku nevnd og játta kr. 4.000.000,00 av íløgum 2007 og at fara undir arbeiðið beinan-vegin.

**Býráðið 1. februar 2007:** Samtykt at taka undir við fíggjarnevndini við 12 atkvøðum fyri og 0 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Kári Árting, Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen, Elin Lindenskov, Annika Olsen, Bjarti Mohr, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen

Greiddi ikki atkvøðu: Jan Christiansen.

7/07 **2005-1356**

**Kloakkviðurskiftini í Rættará**

**Lýsing av málinum í stuttum – samandráttur:**
Vísandi til framløguna frá kloakkevnisdegnum tann 26. januar 2006 er m.a. kravið frá Heilsufrøðiligu starvsstovuni, at allar kommunur skulu hava eitt fullfíggjað og góðkent kloakknet innan 2010.

Arbeiðið at fáa kloakkviðurskiftini í Rættará í rættlag er býtt í tveir partar.

Tann ovari parturin av ánni er frá skúlaheiminum í Marknagili og oman móti Matta-lág/Íslandsvegnum.

Niðari parturin er frá økinum við V. U. Hammershaimbs gøtu/J.C.Svabos gøtu og oman á sjógv.

Víst á kloakkarbeiðini eftir Steinatúni, N. Winthers gøtu, J. Paturssonar gøtu og á økinum undir Bryggjubakka, Vágsbotni og Mylnugøtu. Øll hesi arbeiði eru liður í verkætlanini at fáa vestaruvág reinari.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til, at umsitingin ger eitt útbjóðingartilfar sum undirhondsboð til projekt at senda 2 verkfrøðingastovum at leggja fyri nevndina aftur.

**Tekniska nevnd, 7. september 2006:** Nevndin samtykti, at umsitingin setir seg í samband við ein ráðgeva at gera projekt at leggja fyri nevndina aftur.

**Ískoyti:**
Martin E. Leo Sp/f hevur saman við umsitingini gjørt uppskotið liðugt, og er hetta klárt til útbjóðingar. Mett verður, at skilabest er at bjóða arbeiðið út í innbodnari lisitatión, og at farið verður undir arbeiðið sum skjótast.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at tikið verður undir við uppskotinum og at bjóða arbeiðið út í innbodnari lisitatión, soleiðis at úrslitið av lisitatiónini kann leggjast fyri nevndina til støðutakan í ár.

**Tekniska nevnd 2. november 2006:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá býarverkfrøðinginum og tekniska stjóranum og at fíggja arbeiðið av íløgum fyri 2006.

**Fíggjarnevndin 6. desember 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 14. desember 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur saman við ráðgeva heitt á 5 arbeiðistakarar um at bjóða uppá arbeiðið, og vóru tilboðini latin upp tann 5. desemmber 2006, kl.11,00.

Inn komu hesi tilboð:

| | | |
|---|---|---|
| Andrias Berg. | kr. | 3.499.180,00 |
| SP7f við Sjógv v/ Halli Davidsen, Kollafjørður | kr. | 3.026.306,00 |
| Maskingrevstur v/ Frank Hellisdal | kr. | 2.890.820,00 |
| Sp/f Plan v/ Johs Hellisdal | kr. | 2.801.050,00 |
| Dánial Petersen Kollafjørð | kr. | Einki tilboð |
| | | |
| Kostnaðarmetingin | kr. | 2.160.000,00 |
| **Við projekt/eftirlit- ókent og MVG var metingin** | **kr.** | **2.832.200,00** |

Umsitingin hevur saman við ráðgeva gjøgnumgingið tilboðini, og í skrivi, dagfest 8. desember 2006, viðmælt, at Sp/f Plan fær litið í hendi at gera nevnda arbeiði.

Kostnaðurin fyri arbeiðið verður hesin:

| | | |
|---|---|---|
| Tilboð frá Sp/f Plan | kr. | 2.801.050,00 |
| Ókent | - | 220.000,00 |
| Projekt og eftirlit | - | 285.600,00 |
| MVG 6.25 | - | 206.665,00 |
| Tilsamans | kr. | 3.513.315,00 |
| | | |
| Munur | kr. | 681.111,00 |

Við tað at kostnaðurin fyri arbeiðið bleiv munandi størri enn mett, verður neyðugt at finna pening fyri henda meirkostnað (álj. kr. 681.111,00), og er møguligt at fíggja hetta av avlopinum frá kloakkarbeiðinum, “ Kloakkarbeiðinum í Kúrdali 4. byggistig “ og írestandi av avlopinum frá” kloakkarbeiðinum í Hesti.”

**Kloakkarbeiði í Kúrdali 4.stig** játtan (sambært j.nr.2004-0347/15) kr. 2.946.045,90. Arbeiðið er liðugt og bókað higartil kr. 2.376.127,03. Munur er sostatt kr. 569.957,87.

**Kloakkarbeiðið í Hesti** játtan (samb.j.nr. 2004-2511/11) kr. 3.246.000,00. Arbeiðið er liðugt, og bókað fyri 2006 eru kr.2.567.836,08, meðan bókaðar eru kr. 479.440,55 í 2005. Samanlagt eru bókaðar kr. 3.047.276,63. Munur kr. er sostatt 198.723,37.

Sambært hesum báðum avhendaðu arbeiðum skuldi ein peningaupphædd álj. kr. 569.957,87 + kr. 198.723,37 **ella íalt kr. 768.681,24** verið tøk.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin koma við tilmæli til fundin.

**Tekniska nevnd 13. desember 2006:** Nevndin samtykti at taka undir við tilboðnum frá Sp/f Plan álj. kr. 2.801.050,00, játta 2,9 mió. kr. av íløgum fyri kloakkir 2006, kr. 569.957,87 av avlopinum fyri kloakkarbeiði í Kúrdali 4. stig, kr. 198.723,37 av avlopinum fyri kloakkarbeiði í Hesti og at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Fíggjarnevndin 17. januar 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tekn-isku nevnd.

**Býráðið 1. februar 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

8/07 **2004-0842**

**Frítíðarskúli og skúli til Hoyvíkar skúla**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Byggideildin hevur fingið til vega dispositiónsuppskot av skúla og frítíðarskúla til 1. og 2. flokk til Hoyvíkar skúla. Skúlin og frítíðarskúlin er 2-sporaður til umleið 96 børn. Hjálagt j. nr. 200400823.

Bygningurin verður tilsamans 710 m$^2$ til støddar.
Grundvíddin verður 410 m$^2$

Í sambandi við mál nr. 2003-0215 - Nýggjur fólkaskúli í Hoyvíkshaganum - hevur mentamálanevndin 3. mars 2004 samtykt at byggja ein skúlabygning við verandi Hoyvíkar skúla, sbrt. støðumynd, dagfest 3. mars 2004, sum skal kunna hýsa yngstu flokkunum og frítíðarskúla, og samtykt at játta kr. 100.000,00 av íløgujáttanini 2004 til gerð av dispositiónsuppskoti at leggja aftur fyri nevndina skjótast gjørligt, og beina málið til byggideildina.

Við einum m$^2$ uppá kr.15.265 verður samlaði kostnaðurin íroknað 6,25% mvg mettur at verða kr. 10.837.903.

Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla nevndini til at góðkenna dispositións-uppskotið við tíðarætlan, dagfest 25. juni 2004. Tað ber til at forcera tíðarætlanina til skúlabyrjan, men tað hevur ein meirkostnað við sær.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og deildarleiðarin í mentamálum mæla til at taka undir við tekniska stjóranum og býararkitektinum

Eisini verður mælt til, at kr. 2.150.000 verða játtaðar av íløguætlanini fyri 2004 og kr. 8.700.000 av íløguætlanini fyri 2005.

**Mentamálanevndin 7. september 2004:** Nevndin samtykti at taka undir tilmælinum frá trivnaðarstjóranum og deildarleiðaranum í mentamálum og beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið til samtyktar.

**Fíggjarnevndin 16. september 2004:** Samtykt at leggja málið fyri býráðið.

**Býráðið 23. september 2004:** Atkvøtt varð um tilmælið frá mentamálanevndini 7. september 2004, ið varð samtykt við 9 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Jan Christiansen, Jákup Suni Joensen, Høgni Mikkelsen, Bjarti Mohr, Tórfinn Smith, Elin Lindenskov, Hildur Eyðunsdóttir, Jógvan Arge og Leivur Hansen.

Greiddi ikki atkvøðu: Schumann Hjaltalin og Sjúrður Olsen.

**Ískoyti:**
Jørð- og kloakk arbeiði varð boðið út í desember 2004 sum undirhondsboð. 2 tilboð komu inn, og vóru tey:

1. Andrias Berg SpF kr. 614.120,00 uttan MVG
2. P/f Maskinkoyring kr. 751.206,00 uttan MVG

Bygginevndin mælir til at taka av tilboðnum frá Andrias Berg SpF.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka av tilboðnum frá Andrias Berg uppá kr. 652.502,50 við MVG, sum verður tikið av íløgujáttaninum á skúlaøkinum 2004.

**Mentamálanevndin 17. februar 2004:** Selmar Nielsen, arkitektur, greiddi frá projektinum.

Samtykt at mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, at taka av tilboðnum frá Andriasi Berg sp/f uppá kr. 652.502,50 við mvg, sum verður tikið av íløgujáttanini á skúlaøkinum 2004.

**Fíggjarnevndin 19. januar 2005:** Mikael Viderø, býararkitektur, og Unnie Justinussen, ark., vóru á fundinum og greiddu frá málinum.

Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 27. januar 2005**: Atkvøtt varð um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Katrin Dahl Jakobsen, Elin Lindenskov Beate L. Samuelsen, Høgni Mikkelsen, Jan Christiansen, Bjarti Mohr og Annika Olsen.

Greiddu ikki atkvøðu: Marin Kathrina Frýdal og Sjúrður Olsen.

**Ískoyti:**
Lisitatión av høvuðsarbeiðstøkuni var mánadagin 14. mars 2005. Inn komu 4 tilboð:

| | | |
|---|---|---|
| 1. | Sp/f ÁTS v/ Karstin Vang | kr. 7.190.787,00 |
| 2. | Sp/f Valbjørn Dalsgarð | kr. 7.498.611,00 |
| 3. | Articon | kr. 7.982.246,73 |
| 4. | MT - Højgaard | kr. 10.264.129,00 |

Bygginevndin mælir til at taka av tilboðnum frá sp/f ÁTS, v/ Karstin Vang.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við bygginevndini og at leggja málið fyri býráðið um fíggjarnevndina. Peningur er játtaður á íløguætlanini á skúlaøkinum 2004 og 2005 (býráðssamtykt 23. sept. 2004).

**Mentamálanevndin 6. apríl 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 13. apríl 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 21. apríl 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
**Innbúgv til frítíðarskúlan:**
Ætlanin var, at frítíðarskúlin í Stoffalág 60 skuldi lata aftur, og innbúgvið flytast niðan í frítíðarskúlan í Hoyvík, men av tí at frítíðarskúlin í Stoffalág 60 heldur áfram, verður neyðugt at keypa nýtt innbúgv.

**Økið uttanum frítíðarskúlan:**
Arbeiðsbólkurin fyri nýggja barna- og frítíðarskúlan við Hoyvíkar skúla vil við hesum heita á mentamálanevndina um at játta kr. 375.000,00 at gera uttanumøkið við nýggja skúlan.

Uttanumøkið var við í útbjóðingartilfarinum, men tá ið tilboðini komu inn, var tað ov høgt í mun til kostnaðarmetingina. Tí varð hesin partur av veitingini tikin burtur úr.

Fyri at byggja nýggja skúlan varð neyðugt at broyta atkomuviðurskiftini til verandi skúla og Hoyvíkshøllina. Tað er m.a. hetta arbeiði, ið nú skal gerast aftur.

Viðmerkjast skal, at skúlin stendur við høvuðsinnkoyringina til skúlan og dygst við Vegin Langa, har nógv og tung ferðsla er. Neyðugt er tí at hugsa um ferðslutrygdina, og at økið er trygt hjá børnunum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin fyri barna- og ungdómsdeildina mæla til at játta kr. 75.000,00 til innbúgv til frítíðarskúlan í Hoyvík og kr. 375.000,00 til økið uttanum frítíðarskúlan av íløgum á barnaansingarøkinum.

**Mentamálanevndin 26. juni 2006:** Unnie Justinussen greiddi frá málinum um økið uttanum frítíðarskúlan, og Frígerð Sundskarð greiddi frá málinum um innbúgv til frítíðarskúlan í Hoyvík.

Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Ískoyti:**
Sum kunnugt skuldi frítíðarskúlin í Stoffalág 60 lata aftur, og innbúgvið flytast niðan í nýggja frítíðarskúlan í Hoyvík. Av tí at frítíðarskúlin í Stoffalág helt fram at virka, kundi hetta ikki gerast. Í juni 2006 varð søkt um eykajáttan til gardarobu og steintoy á 75,000 kr.

Nú nýggi Frítíðarskúlin í Hoyvík er farin at virka, vísir tað seg, at tørvur er á fleiri pengum til innbúgv, leikur og amboð. Lutvíst tí, at hædd ikki varð tikin fyri hesum í verkætlanini, tí ætlanin var at endurnýta tað sum var í Stoffalág 60, lutvíst tí barnatalið er hækkað úr 90 upp í 117.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin fyri barna- og ungdómsdeildina mæla til at játta kr. 200.000,00 til innbúgv, leikur og amboð til frítíðarskúlan í Hoyvík av íløgum á barnaansingarøkinum.

**Mentamálanevndin 4. oktober 2006:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá trivnaðarstjóranum og leiðaranum fyri barna- og ungdómsdeildina og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. oktober 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 26. oktober 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
**Mál viðvíkjandi nýggjum duri til barnaskúlan í Hoyvík**
Umboð fyri byggideildina greiða frá málinum.

**Tilmæli:**
Neyðugt verður at byggja nýggjan dur og klædnagoymslu til smábarnaskúlan/frítíðar-skúlan í Hoyvíkar skúla.

Vísandi til uppskot frá arkitektinum Selmari Nielsen verður neyðugt at byggja 56 m² uppí verandi skúla.

Bygginevndin mælir mentamálanevndini at góðkenna projektið og at játta kr. 1.193.000 íroknað 6,25 % mvg. Hædd er ikki tikin fyri møguligum prís- og lønarvøkstri.

Bygginevndin mælir somuleiðis til at innheinta tvey undirhondstilboð.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at peningurin, kr. 1.193.000,00, verður játtaður av konto 90, íløgum á skúlaøkinum.

**Mentamálanevndin 10. januar 2007:** Samtykt at taka undir tilmælinum hjá trivnaðar-stjóranum og mentamálaleiðaranum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. januar 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og játta kr. 1.200.000 av íløgum.

**Býráðið 1. februar 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**9/07** **2006-3836**

**Skriv frá Advokatskrivstovuni, dagfest 21. desember 2006, um góðkenning av viðtøkum fyri eigarafelagið Blómubrekka.**

**Fíggjarnevndin 17. januar 2007:** Samtykt at leggja málið fyri býráðið.

**Býráðið 1. februar 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**10/07** **1999-0606**

**Skipanarætlan fyri rennibreytina.**

**Lýsing av málinum, samandráttur.**
Býarskipanardeildin hevur, vísandi til mentamálanevndarsamtyktina dagfest 24. juni 2003, og samtyktina í byggi-og býarskipannevndini j. nr. 9902090-1, gjørt skipanar-ætlan fyri økið á Hálsi har ein rennibreyt er staðsett.

Uppskotið skipar økið við einari rennibreyt við 8 geirum og einum fótbóltsvølli inni í miðjuni.

Øki er lagt av til parkering og møguligar bygging til virksemið.

Skipanarætlanin leggur upp til at ásetingarnar fyri fyri økið skulu broytast frá at vera C2 - opin miðstaðarbygging til at verða D2 ítróttarøki fyri tað økið har rennibreyting liggur.

Ætlanin hevur eisini við sær, at onnur vegatgongd skal finnast til matr.nr. 1394 – sethús og grundstykki og matr.nr. 1408 b og 1408 c – ogn hjá Føroya Tele (dagstovnurin KURLAN).

Ein slík rennibreyt við einum fótbóltsvølli í miðjuni hevði verið eitt skilagott uppískoyti til Gundadal og á Hálsi sum ítrottarøkið.

Hjálagt er uppskot til skipanarætlan j. nr. 200202698-4

**Tilmæli:**
Deildarleiðarin í mentamálum mælir til at arbeitt verður víðari við málinum, og at ein byggiskrá verður gjørd fyri verkætlanina.

**Mentamálanevndin 21. apríl 2004:** Samtykt at arbeiðssetningurin verður soljóðandi:

**Arbeiðssetningur**
Arbeiðsbólkur verður settur at gera eina byggiskrá til ger av rennubreyt við tilhoyrandi økjum og útgerð í Tórshavnar kommunu.

**Byggiskráin skal m.a. innihalda:**
- Skipanarætlan fyri økið á Hálsi, sambært j. nr. 9902090-1, sum plandeildin hevur gjørt, herundir:
  - Stødd, plasering o.a.
  - Uttanduraøki
  - Hølisskrá
  - Atkomuviðurskifti
  - Útbyggingarmøguleikar
- Ognarviðurskifti

- Tíðarætlan
- Leiðbeinandi kostnaðarmeting, býtt sundir í:
  - Undirlendisarbeiðið
  - Breyt við 8 geirum
  - Miðøki við einum fótbóltsvølli
  - Uttanumøki, atkoma, parkering og møguligar bygging til ymiskt virksemið, t.d. gistingarhús.
  - Møguliga atkoma til verandi stadionøki

Bólkurin eigur eisini at hava fyrilit fyri myndugleikakrøvum og øðrum viðurskiftum, soleiðis at hesi verða lýst, nevnast kann m.a.:

**at** byggisamtyktini skal broytast frá at vera C2 – opin miðstaðarbygging til at verða D2 ítróttarøki.
**at** kommunan má ogna sær uml. 4000 $m^2$ frá matr.nr. 1393.
**at** vegatgongd til grannaognir skulu fáast upp á pláss.

Byggiskráin skal leggjast fyri mentamálanevndina í seinasta lagi 30. juni 2004.

Eisini samtykt at arbeiðsbólkurin hevur 3 limir:

1 umboð fyri Trivnaðarfyrisitingina, sum verður formaður
1 umboð fyri Teknisku fyrisitingina og
1 umboð fyri Sersamband fyri frælsan ítrótt

og at játta kr. 200.000 av konto 64 til byggiskránna.

**Mentamálanevndin 30. juni 2004:** Málið varð lagt fram og verður arbeitt víðari við málinum at leggja fyri nevndina aftur eftir summarfrítíðina.

**Mentamálanevndin 7. september 2004:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Avgerandi fortreyt fyri at økið kann brúkast til rennibreyt, er at broyting verður gjørd í byggisamtyktini, har økið verður broytt frá C2-opin miðstaðarbygging til at verða D2, ítróttarøki.

Serstøk byggisamtykt er fyri lítlan part av økinum, sum er kannaður traðarbrúki og velt lendi. Men við atliti til, at talan er um so lítlan part av verkætlanini sum verður umfataður av hesum, og vísandi til at aðrir vegir eru lagdir í økinum undir somu ásetingum, metir býararkitekturin ikki at hetta kann hava við sær at neyðugt verður at broyta serstøku byggisamtyktina.

**Tilmæli:**
Vísandi til samtykt 22. mars 2004, tá byggi- og býarskipanarnevndin góðkendi skipanarætlan fyri økið, soleiðis at arbeiðast kundi víðari við málinum at leggja fyri nevndina aftur. Býararkitekturin mælir til at nevndin tekur undir við ætlanini, so at farast kann undir at broyta byggisamtyktina fyri økið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. juni 2005:** Samtykt at taka undir við ætlanini, og at mæla býráðnum til at broyta byggisamtyktina sambært kortskjali 1999-0606/32, dagfest 13. juni 2005, frá C2 øki til D2 øki.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at góðkenna byggiskránna, dagfest 14. juni 2005, og at játta peningin, kr. 700.000,00, ið er tøkur á konto 64, til projektering

**Mentamálanevndin 14. juni 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 15. juni 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og mentamálanevndini.

**Býráðið 23. juni 2005: Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.**

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til at bjóða arbeiðið út.

**Mentamálanevndin 8. mars 2006:** Býararkitekturin greiddi frá málinum, sum verður viðgjørt á einum seinni fundi í mentamálanevndini.

**Mentamálanevndin 4. apríl 2006:** Útsett.

**Ískoyti:**
Bygginevndin hevur kannað møguleikar fyri endaliga staðseting og skipan av rennibreytini og vil grunda á lýsinda tilfar, ið er fingið tilvega, mæla til, at farið verður undir at gera eina rennibreyt á Hálsi. Sí kortskjal nr. 19990606 dagfest. 19.05.2006.

Hjálagt er eisini kostnaðarmeting uppá verkætlanina og verður heitt á býráðið, umvegis fíggjarnevndina, at útvega neyðuga pening til verkætlanina.

Vísandi til avgerð í bygginenvndini um skipan av arbeiðinum, mælir nevndin víðari til, at tikið verður av innkomna undirhondsboð uppá arbeiðið at grava oman av á økinum. Hjálagt eru tvey innkomin undirhondsboð.

Vísandi til mannagongd fyri bygging/verkætlanir í Tórshavnar kommunu, mælir bygginevndin víðari til at senda málið til ummælis í hinum faknevndunum.

**Mentamálanevndin 24. mai 2006:** Tvey tilboð eru innkomin:

Karl Patursson kr. 1.189.050,00
Robert Brockiekr. 1.565.483,00

Mentamálanevndin samtykti at mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, at taka av tilboðnum frá Maskinkoyring við Karl Patursson kr. 1.189.050,00.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 30. mai 2006:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 31. mai 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Ískoyti:**
Støðuplanur av verkætlanini hevur verið viðgjørdur í teknisku umsitingini.

Eftir sum einki ítøkiligt tekniskt projekt fyriliggur í løtuni, verður greitt frá verkætlanini og hvørji atlit eiga at verða tikin í sambandi við ymsum tekniskum viðurskiftum.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til at arbeitt verður víðari við projektering av verkætlanini.

**Tekniska nevnd 1. juni 2006:** Nevndin mælir til, at verkætlanin eisini fevnir um betri atkomuviðurskifti frá Sundsvegnum og eina tryggari gonguleið til Gundadalsøkið umframt tekniskar veitingar so sum kloakk, vatn, ljós o.a. at leggja fyri nevndina aftur.

**Býráðið 8. juni 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Arbeitt hevur síðani verið við at kanna ymisk viðurskiftir í økinum, sum liður í endalig projektering. Hesar kanningarnar eru gjørdar í tøttum samstarvi við teknisku fyrisiting – tekniska deild og heilsu- og umhvørvisdeildir hjá TK og landinum, og hava hesar kanningarnar ført við sær, at ávíst neyvari kanningargreystur er neyðugur og kann hava við sær broytt arbeiðslag enn upprunaliga ætlað.

**Tilmæli frá ráðgeva:**

*Viðv.: Rennibreyt á Hálsi*.

*Í samband við grevsturin av leysa áskotinum fram við Norðara Ringveg er gjørdur ein royndargrevstur í helluni, sum ætlanin var at spreingja seinni. Grevsturin er gjørdur við tí á staðnum verandi maskinu. Hellan er rættiliga stabbakend, og tað ber til at "grava" hana. Tilfarið, sum kemur frá maskinuni, sær út sum knúst tilfar, ið er sera væl hóskað til planering av m.a. veg- og parkeringsøkinum. Hetta opnar fyri møguleikanum at gera vegin oman til Kurlu við endaligari umlegging av instalatiónum, eins og at seta*

*lyktafundamentir, kantsteinar í ytra borði og fáa skráan móti ringvegnum og Sundsvegnum lidnan í verandi arbeiðstøku. Í hesum umfari verður eisini nýggja parkeringsøkið við Kurlu gjørt.*

*Arbeiðið við grevstri á økinum, har gamli verkstaðurin hjá Tórshavnar kommunu stóð, er í løtuni lagt stilt orsaka av manglandi plássi í Húsahaga. Um farið verður undir omanfyri nevndu ætlan, kann hetta arbeiði fremjast, meðan TK greiðir viðurskiftini í Húsahaga, og harvið kann arbeiðið sum heild ganga víðari. Verður hendan ætlan framd, er næst komandi arbeiðsveiting eitt greitt definerað øki uttan fyribilsloysnir.*

*Parkeringsøkið, sum skal gerast á verandi ruskøki, verður planerað í staðin fyri at leggja grót í rúgvu. Hetta verður uttan gjald, tí tað er líka lætt at gera planeringina sum at leggja grót í rúgvu. Atkoman til Kurlu verður sum hon er í løtuni, til hon verður broytt til endaliga atkomu. Við hesi loysn verður soleiðis ikki neyðugt at gera fyribils atkomu tvørtur um ognina hjá Shell. Koyringin eftir ognini hjá Føroya Termovirki verður bert nýtt í sambandi við atkomu til vegin Undir Svartafossi. Vegurin frá gamla Sundsvegnum til ognina hjá Jóa og Randi Ziska, sum liggur á tyrving, kann eisini takast burtur í hesi arbeiðsgongd.*

*Sambært avtalu hava vit gjørt eina skitsuætlan fyri arbeiðsgongdina og tilhoyrandi tilboðslista fyri hesa arbeiðsveiting.*

*Maskinkoyring hevur givið hjálagda tilboð, dagfest 29.08.2006, uppá hesa arbeiðsveiting, áljóðandi kr. 2.101.300,00 uttan mvg, og arbeiðið kann fremjast uppá 12 vikur. Um tað gerst neyðugt at brekka í støðum, verður einki eykagjald í hesum sambandi.*

*Vit hava kannað kostnaðin og vilja mæla ti, at tikið verður við tilboðnum. Er áhugi fyri hesi ætlan, vil Verkfrøðingastovan beinanvegin broyta projektið í samsvar við broyttu fortreytirnar.*

Bygginevndin er á fundi kunnað um hesa ætlan og hevur einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum frá Verkfrøðingarstovuni og mælir tískil býráðnum, umvegis fíggjarnevndina, til at taka av tilboðnum frá Maskinkoyring áljóðandi 2.101.300,00 kr. uttan mvg.

Víðari í málinum er TK í tí støðu at umhugsast skal, um ikki tað kann loysa seg at taka støðu til niðanfyristandandi tilmæli frá Verkfrøðingarstovuni grundað á trupulleikunum, sum standast av, at tyrvingarplássið í Villingardali, ikki sum er, er ført fyri at taka ímóti tilfar til tyrving.

*Vísandi til avtalu á fundi við bygginevndina 31.08.2006 hevur Verkfrøðingastovan 01.09.2006 sett fyrispurning til Heilsufrøðisligu Starvsstovuna um loyvi til at tyrva meginpartin av tilfarinum á staðnum í staðin fyri sum ætlað í Húsahaga.*

*Heilsufrøðisligu Starvsstovunan hevur við viðhefta skrivi, dagfest 07.09.2006, góðkent ætlanina við ávísum treytum.*

*Grundað á at loyvi er fingið til eina loysn, har tilfarið frá gamla ruskplássinum við serligari fyriskipan verður lagt út sum fylla undir rennibreytini, verður heitt á Tórshavnar kommunu um at geva Verkfrøðingastovuni heimild til at fara undir samráðingar við Maskingrevstur um í minsta lagi at gera neyðuga arbeiði við avgrevstri v.m. á matr. nr. 1395, soleiðis at tann ígongdverandi arbeiðstøkan, sum er steðgað, kann halda áfram, og øskan v.m.,. sum liggur á matr. nr. 1395, og sum fylla í vegnum Undir Svartafossi verður innbygd undir vøllinum.*

*Sum trýstið er á arbeiðsmarknaðinum í løtuni, meta vit tað rætt sum skjótast at gera avtalu við Maskinkoyring um framhaldandi arbeiði, tó sjálvsagt treytað av at semja fæst um kostnaðin.*

Bygginevndin er somuleiðis á fundi kunnað um hesa ætlan og hevur einmælt samtykt at taka undir við uppskotinum frá Verkfrøðingarstovuni og mælir tískil býráðnum, umvegis fíggjarnevndina, til at loyva Verkfrøðingarstovuni at innheinta eitt slíkt tilboð.

Býararkitekturin og ráðgevin koma á fund at greiða frá.

**Fíggjarnevndin 13. september 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til, um mentamálanevndina, at taka undir við tilmælinum hjá bygginevndini og taka av tilboðnum hjá Maskinkoyring uppá kr. 2.101.300 uttan mvg og at taka upp samráðingar við Maskinkoyring um víðari arbeiðstøku.

**Mentamálanevndin 20. september 2006:** Nevndin samtykti at taka undir við fíggjarnevndarsamtyktini 13. september 2006.

**Býráðið 21. september 2006:** Einmælt samtykt.

**Viðgerð av tilboðum uppá belegning til rennibreytina**
Polytan er komið við fullfíggjaðum tilboði uppá belegning til rennibreytina á Hálsi. Tilboðið ljóðar uppá 2.869.333 við útgerð. Uttan útgerð er tilboðið uppá 2.376.893.

Í byggiskránni er belegningur og undirlag mett til 3.6 mio. Í stórum tølum samsvarar hetta við tilboðið, um asfaltið verður roknað til 200 kr fermeturin ella 1.3 mio tilsamans.

Í kostnaðarmetingini er roknað við 13 mm belegningi. Eftir norsku ásetingunum er tjúgdin 15 mm belegningur. Tilboðið frá Polytan er við 15 mm belegningi.

Tilboðið frá Polytan er kannað. Prísirnir samsvara við prísum frá líknandi verkætlan í Noreg.

Mælt verður til at taka av tilboðnum uppá belegning til frá Polytan uppá kr. 2.376.893.

Málið um útgerð verður tikið upp á seinni fundi.

**Belegningur v.m.**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 2.1.1 | Kanning av undirarbeiði | 1 stk. | 12.000,00 | 12.000 |
| 2.1.2 | Verndartiltøk | 1 stk. | 8.000,00 | 8.000 |
| 2.1.4 | Byggiplássrakstur | 1 stk. | 12.000,00 | 12.000 |
| 2.1.5 | Byggipláss-skúr o.l. | 1 stk. | 8.000,00 | 8.000 |
| 2.2.1.1 | 15mm belegningur | 6.500 m² | 278,00 | 1.807.000 |
| 2.2.1.2 | belegningur í vatngrøv | 15 m² | 540,00 | 8.100 |
| 2.2.1.2 | Meirkostnaður fyri 22 mm | 134 m² | 177,00 | 23.718 |
| 2.2.1.2 | Meirkostnaður fyri kantar | 900 m | 12,00 | 10.800 |
| 2.2.1.3 | Satsplankar | 8 stk. | 5.400,00 | 43.200 |
| 2.2.1.4 | Stavkassi við lok | 1 stk. | 5.600,00 | 5.600 |
| 2.2.1.5 | Belegningur á lok | 3 stk. | 250,00 | 750 |
| 2.2.1.6 | Belegningur á lok | 3 stk. | 125,00 | 375 |
| 2.2.2 | Uppmáting-kontroll.merkjapl. | 1 stk. | 130.000,00 | 130.000 |
| 2.2.3 | Test | 1 stk. | 40.000,00 | 40.000 |
| 2.2.4 | Sargur | 1 stk. | 75.000,00 | 75.000 |
| 2.2.5 | Rakstrar og viðlíkahaldsætlan | 1 stk. | 6.000,00 | 6.000 |
| 2.2.6 | Kantsteinar | 480 m | 290,00 | 139.200 |
| 2.2.6 | Lok til vatngrøv inkl belegning | 1 stk. | 42.500,00 | 42.500 |
| 2.2.6 | Bummsett | 1 stk. | 4.650,00 | 4.650 |
| 2.2.6 | Ringur og stopplanki | 1 stk. | 5.500,00 | 5.500 |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Belegningur tilsamans** | | | | | **2.376.893** |
| | Asfalt (mettur kostnaður) | 6.500 m² | 200 | 1.300.000 | |
| | | | | | **1.300.000** |
| **Tilsamans 1)** | | | | | **3.676.893** |

1) í byggiskránni er henda veitingin u. útgerð mett til 3,6 mio.

**Tilmæli frá bygginevndini:**
Leivur Hansen, limur, er kunnaður um tilmælið og hevur boðað frá, at hann tekur undir við nevndini, og er hetta tískil ein samd nevnd, sum mælir til at taka av tilboðnum.

Bygginevndin fyri rennibreytina mælir til at taka av tilboðnum frá POLYTAN, áljóðandi 3.676.893 kr. uttan mvg.

**Mentamálanevndin 16. januar 2007:** Samtykt at mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, at taka av tilboðnum frá POLYTAN, áljóðandi kr. 3.676.893,00 uttan mvg.

**Fíggjarnevndin 17. januar 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 1. februar 2007:** Einmælt samtykt.

11/07 **2006-3032**

**Vinnustykki í Kollafirði**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Umsitingin hevur staðsett øki til vinnustykki í Kollafirði. Vísandi til vaksandi eftirspurningur eftir vinnustykkjum, hevur Býarskipan víst á økið vestan fyri landsvegin.

Staðsetingin er grundað á framtíðar heildarætlan fyri samlað øki, har vinnuútstykkingar og framtíðar havnabygging í Kollafirði vil kunna stuðla hvørjum ørðum og gerast týðandi vinnuorkumiðdepil í kommununi. Hjálagt er kortskjal dagfest 02.10.2006 j. nr. 2006-3032.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til, at nevndin tekur undir við uppskoti um staðseting av nýggjari vinnuútstykking í Kollafirði vestan fyri landsvegin, soleiðis at arbeiðast kann víðari við málinum at leggja fyri nevndina aftur við uppskot til útstykkingarætlan, kostnaðar-meting.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 2. oktober 2006:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

Samstundis samtykt at leggja málið fyri kollfjarðanevndina til kunningar.

**Kollfjarðarnevndin 20. november 2006:** Nevndin er kunnað - framlagt.

**Ískoyti:**
Í sambandi við uppskotið til útstykkingarætlan til vinnustykki, vestan fyri landsvegin til tunnilin í Kollafirði, er neyðugt at broyta byggisamtyktina fyri økið. Hetta liggur nú sum 4. grundumráði - Landbúnaðarøki.

Økið, talan er um, liggur vestan fyri landsvegin til tunnilin í Kollafirði yvir ímóti royndarstøðini, sum er partur av matr. nr. 319a, Kollafjørður. Tilsamans er økið uml. 82.000 $m^2$.

Skotið verður upp, at økið verður broytt til B8-vinnuøki við niðanfyri standandi ásetingum.

*§ 15. Ásetingar fyri umráðispart B8 í 3. grundumráði*

1. *Loyvt er einans at byggja hús til vinnuvirki, herundir umsitingar- og tænastuvirki, verksmiðjur, goymslur og tílíkt og til tænastuvirksemi, ið hevur samband við hesi.*
2. *Byggingin skal verða sett samsvarandi heildarætlan fyri alt økið ella fyri hóskiligar partar av økinum.*
3. *Byggistigið má ikki fara upp um 0,5.*
4. *Rúmmálið á húsunum má ikki fara upp um 3,0 m³ fyri hvønn m² av grundstykkinum.*
5. *Eingin partur av útveggi ella tekju má verða hægri enn 13 m, tó kunnu neyðugir tekniskir húsalutir verða hægri eftir nærri góðkenning býráðsins.*

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at byggisamtyktin fyri Kollafjørð verður broytt sambært hjálagda kortskjali, dagfest 18. desember 2006.

**Byggi- og býarskipanarnevndin tann 19. desember 2006:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 1. februar 2007:** Einmælt samtykt.

**12/07** **2007-0113**

**Val av limum og varalimum í stýrið fyri Lágargarð fyri 2 ár.**

Hesir limir standa fyri vali:

| **Fastir limir:** | **Varalimir:** |
|---|---|
| Tórhallur Áslaksson | Beinta Øssursdóttir |
| Marianna Heinesen | Maud W.Hansen |
| Katrin Dahl | Súsanna Dam |

Tórhallur Áslaksson flutti úr kommununi í august í fjør, og síðani tá hevur Beinta Øssursdóttir røkt nevndarsessin.

**Býráðið 1. februar 2007:** Samtykt at velja

**Fastir limir:**
Beinta Øssursdóttir
Marianna Heinesen
Katrin Dahl

**Varalimir:**
Áki Andreasen
Maud W.Hansen
Súsanna Dam

**FUNDUR LOKIN KL. 19.15**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Jógvan Arge | Leivur Hansen | Kári Árting |
| Marin Katrina Frýdal | Katrin Dahl Jakobsen | Elin Lindenskov |
| Annika Olsen | Bjarti Mohr | Beate L. Samuelsen |
| Sjúrður Olsen | Høgni Mikkelsen | Jan Christiansen |
| | Heðin Mortensen | |